# SUMMARTILBOÐ

## Fleiri útvaldir bilar til serprís



### BMW 320d

listaprísur kr. 465.000,-
spar kr. 55.000,-

- 17" ALU felgur
- Eyka úterð
- Metallak

nú kr.
**409.000,-**




### Punto Dyn.

listaprísur kr. 192.700,-
spar kr. 23.000,-

- 17" ALU felgur
- Fart Pilot
- Metallak

nú kr.
**169.700,-**




### Punto Sport

listaprísur kr.189.700,-
spar kr. 22.700,-

- 17" ALU felgur
- Fart Pilot
- Tokulygtir
- Metallak

nú kr.
**167.000,-**



### BMW 320i

listaprísur kr. 450.000,-
spar kr. kr.70.000,-

- ALU felgur
- Eyka útgerð
- METALLAK

nú einans kr.
**360.000,-**

NORDCAR | Smiðjugerði 4 · 100 Tórshavn · Tel 30 80 80
nordcar@nordcar.fo · www.nordcar.fo



# Leiðari til dagstovnin í Løkjatúni á Argjum

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara til dagstovnin í Løkjatúni á Argjum at byrja 1. september 2008 ella eftir avtalu. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Stovnurin hevur vøggustovu við 10 børnum, barnagarðsstovu við 16 børnum og frítíðarskúla við børnum í 1. og 2. flokki úr Argja skúla. Komandi summar flytur frítíðarskúlin í nýggja skúlan á Hamrinum. Tá verður stovnurin vøggustova og barnagarður burturav.

**Vit bjóða**

- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum, og har spælið fyllir nógv
- møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving
- felagsskap í kommunalt fyriskipaðum netbólki millum dagstovnaleiðarar

**Vit vænta, at tú**

- ert útbúgvin pedagogur og hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemið á einum stovni, ið rúmar bæði vøggustovu, barnagarði og frítíðarskúla
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgunum
- hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi
- sær møguleikar fram um vansar
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innanhýsis og uttanhýsis
- hevur teldukunnleika á brúkarastigi

**Setanarviðurskifti**

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknarfreist**

Umsóknir við viðmælum og upplýsingum um royndir og útbúgving skulu vera Tórshavnar kommunu, Vaglið, postboks 32, 110 Tórshavn í hendi innan mikudagin 30. juli 2008.

**Meira at vita**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, tlf. 302010, ella Katrina Petersen, deildarleiðara, tlf. 302010/214032.

SENDISTOVAN

**Tórshavnar kommuna**